bústaðir
Føroya bústaðafelag

Yviri við Strond 6
Postsmoga 215
110 Tórshavn

Tel. +298 401000
bustadir@bustadir.fo
www.bustadir.fo

# Finsen

## Tróndargøta 52

## Felagshølir í niðastu hædd

## Tórshavn

## Húsreglur fyri felagshølini á Finsen

Vanligar dagar, tá tað ikki er halgidagur, kunnu leigarar á Finsen brúka hølini mánadag til fríggjadag kl. 08-17. Vanligu treytirnar um ikki at vera til ampa fyri onnur og ikki at órudda uttanfyri hølini eru galdandi. Tey, sum brúka hølini, skulu hvør í sínum lagi rudda og vaska upp eftir sær, áðrenn farið verður úr hølunum.

Har útyvir ber til at leiga hølini soleiðis:

Hølini kunnu leigast til leigarar í Finsen við at senda teldupost til Bústaðir. Leigumálið kann ikki taka við, fyrr enn skrivlig váttan er fingin frá Bústøðum og leiga og leigari hevur undirskrivað lyklaváttan, har leigari eisini váttar seg at vilja fylgja hesum húsreglum.

1. Bert leigarar, ið standa sum leigarar í leigusáttmálanum, kunnu leiga hølini.
2. Avtalast skal við Bústaðir ella umboð fyri Bústaðir, hvussu fingið verður fatur á lykli og hvar/nær, lykilin skal latast inn aftur.
3. Hølini eru tøk til leigu í hesum tíðarskeiðum og til henda kostnað:

| Dagur | Frá kl. | Til kl. | Kostnaður |
|---|---|---|---|
| **Mánadag** | 17:00 | 22:00 | Kr. 200,00 |
| **Týsdag** | 17:00 | 22:00 | Kr. 200,00 |
| **Mikudag** | 17:00 | 22:00 | Kr. 200,00 |
| **Hósdag** | 17:00 | 22:00 | Kr. 200,00 |
| **Fríggjadag** | 10:00 | - | - |
| **Leygardag** | - | - | - |
| **Sunnudag** | - | 22:00 | Kr. 500,00 |

- Halgidagar telja sum sunnudagar.
- Bústaðir kann avgera, at hølini ikki eru tøk ávísar dagar.
- Skrivstovan hjá Bústøðum kann brúka hølini ávísar tíðir/dagar.

4. Um hølini verða leigað dagar, har tað ikki er gerandisdagur aftaná, ber til at brúka hølini í mesta lagi fram til kl. 02 um náttina við tí avgjørdu fortreyt, at leigarar á somu hædd, sum felagshølini eru, og nærmastu grannar, skrivliga hava góðtikið tað, samstundis sum leigarar á Finsen ikki skulu hava ampa av tí.
5. Um tað hava verið kærur, um hølini eru illa frágingin ella um tiltak hevur verið til ampa fyri grannar, verður eyka kostnaður lagdur á leiguna á í minsta lagi kr. 500,00.
6. Mælt verður til, at tann, sum leigar, kannar, um tað er gjørt reint og at tað, sum skal vera í hølunum, er har, sum tað skal vera, fyri at sleppa undan at ábyrgdast fyri, at tað eru manglar, tá farið verður úr aftur hølunum. Tá hølini eru tikin í nýtslu, hevur leigarin ikki longur møguleika fyri at

gera galdandi, at hølini ikki vóru gjørd rein, ella at tað vóru aðrir manglar, áðrenn tey vórðu tikin í brúk.

7. Hølini og uttanumøkini, sum hava verið brúkt í sambandi við at hølini eru leigað, og har møguligt avfall o.tíl. kann vera komið frá einhvørjum tiltaki í sambandi við tað, skulu vera ruddilig og gjørd rein skjótast gjørligt aftaná at tiltakið er liðugt og í allar seinasta lagi áðrenn næsta leigumál í fyrsta lagi kann taka við sambært yvirlitinum omanfyri.
8. Fyri at tryggja, at grannar og onnur kunnu fáa fatur á leigaranum, um okkurt er áfatt, skal tann, sum leigar, ella sambúgvandi partur hjá leigaranum, vera til staðar og vera til at fáa fatur á í hølunum, meðan tiltakið er.
9. Leigarin hevur ábyrgdina fyri tí, sum fer fram í hølunum og uttanfyri hølini, meðan leigað verður, uttan mun til um tað er leigarin sjálvur, húsfólk hjá leigara ella onnur, ið leigari hevur latið inn í hølini, ið hava atburð, ið ikki kann góðtakast.
10. Um leigari ikki er til staðar í hølunum ella ikki tekur tað í álvara, tá sagt verður frá, at tað verður larmað ov illa ella at leigari ella onnur, ið leigari hevur latið inn í hølini, gera ónáðir, kann eyka kostnaður verða lagdur á leiguna. Tílíkar hendingar kunnu eisini viðføra, at leigari fær karantenu fyri at leiga hølini aftur og eisini at leigari kann fáa áheitan/ávaring frá útleigara fyri brot á húsreglurnar.
11. Leigari hevur ábyrgdina fyri, at tiltøk ikki órógva aðrar leigarar og onnur við larmi o.tíl. Tiltøk órógva, um aðrir leigarar ella grannar venda sær til leigara um tað. Um aðrir leigarar ella grannar venda sær til leigara aftaná kl. 22, skal alt tiltakið fara fram innandura. Vindeygu og hurðar skulu verða afturlatin. Tiltakið skal vera somikið friðarligt, og møguligur tónleikur skal ikki verða harðari, enn at onnur ikki hava ampa av tí.
12. Royking er ikki loyvd í bygninginum. Ansast skal eftir, at roykur ikki kemur inn gjøgnum hurðar/vindeygu. Leigari hevur ábyrgdina fyri, at allir sigarettstubbar o.tíl. er burtur frá uttanumøkjunum, tá tiltakið er liðugt.
13. Tað kunnu í mesta lagi vera 50 fólk til tiltøk í hølunum.
14. Tá hølini verða latin aftur til Bústaðir ella næsta leigara, skulu tey vera rein og ruddilig (felagshølir, gangir, WC-rúm á ganginum í niðastu hædd, trappur til niðastu hædd, uttanumøkir v.m.), so tey eru klár til næsta leigara at brúka.
15. Um hølini ikki eru rein og ruddilig (felagshølir, gangir, WC-rúm á ganginum í niðastu hædd, trappur til niðastu hædd, uttanumøkir v.m.), so tey eru klár til næsta leigara at brúka, tá Bústaðir fær hølini aftur, skipar Bústaðir fyri, at hølini verða vaskaði og ruddaði, og ber leigarin kostnaðin fyri tað.

**<u>Leggið til merkis</u>**, at leigari hevur ábyrgdina av, at hesar húsreglur fyri nýtslu av felagshølinum í niðastu hædd á Tróndargøtu 52 á Finsen verða hildnar. Leigari verður ábyrgdaður fíggjarliga fyri møguligar skaðar, uttan mun til, um tað er leigari sjálvur, húsfólk hjá leigara ella onnur, ið leigari hevur latið inn í hølini, ið hava elvt til skaðan. Eisini ábyrgdast leigarin fíggjarliga fyri manglandi ella vánaliga reingerð og manglandi ella vánaliga upprudding (bæði inni og úti). Møguligt uppkrav fyri at hava ábyrgdina fyri hesum verður gjørt gjøgnum uppkrevjing av húsaleiguni hjá leigara.

**Tráðleyst wifi:**
Internet: bustadir
Loyniorð: Finsen5052.

**Vakt telefon hjá húsavørðunum (bert í neystøðum):**
Kl. 16-08 gerandisdagar og frá kl. 15 fríggjadag til mánamorgun kl. 08.
Tel. 401040

bústaðir
Føroya bústaðafelag

Yviri við Strond 6
Postsmoga 215
110 Tórshavn

Tel. +298 401000
bustadir@bustadir.fo
www.bustadir.fo

**Standard uppsetingar:**

Stólar og borð skulu vanliga verða sett soleiðis, at sofa við sofaborði vendur móti sjónvarpinum og tey bæði størri borðini við stólum eru sett upp móti vegginum. Ikki brúkt stólar/borð skulu stáplast/setast móti vegginum í tí parti av hølunum, har køkurin er.

Til uppdekning til 50 fólk kunnu borð og stólar verða sett soleiðis:




Bústaðir, mai 2022